# Eimskip hevur frígoymslu



*Fyrsta frígoymslan í Føroyum er í pakkhúsinum hjá Eimskip á Eystaru bryggju í Havn*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Fyrsta frígoymslan í Føroyum varð skipað í pakkhúsinum hjá Eimskip á Eystaru Bryggju í Havn í januar. Skipanin lættir væl um hjá teimum, sum innflyta og selja víðari**

INNFLUTNINGUR

Nú ber til at leggja vørur á frígoymslu í Føroyum. Eimskip hevur gjørt eina slíka í pakkhúsinum á Eystaru Bryggju í Tórshavn.

Tað eru fleiri fyrimunir við eini frígoymslu. Vøran kann flytast inn og leggjast á goymslu, uttan at neyðugt er at leggja pening út fyri avgjøld so sum mvg og møguligan toll. Og tað verður eisini væl minni av pappírsarbeiði, tá vøran í veruleikanum bara skal avgreiðast einaferð heldur enn fleiri ferðir.

Frígoymslan virkar á tann hátt, at eitt felag flytir eina ávísa vøru til Føroya og leggur hana á goymsluna. Har kann hon so liggja avgjaldsfrí, til tann, sum skal brúka hana, fer eftir henni. Tá so er, verður tað brúkarin, sum loysir vøruna út, og innflytarin ella seljarin, sleppur undan tí pappírsarbeiði sum stendst av at tollgreiða vøruna og síðan selja hana aftur.

Frígoymslan kann eisini koma teimum til góðar, sum ikki hava nógv goymslupláss. Har ber til at hava vøruna liggjandi ótollgreidda í upp til trý ár.

Møguleikin fyri frígoymslum hevur verið til staðar eina tíð, men eingin hevur tó tikið stig til hetta, fyrr enn nú, Eimskip hevur sett eina slíka á stovn.

Tað krevur tó, at ávísar reglur verða hildnar, um ein skal hava eina frígoymslu. Loyvi skal fást bæði frá Landsstýrinum og Toll- og Skattstovuni. Toll- og Skattstovan hevur eftirlit við tí, sum kemur og fer um eina slíka goymslu.

**ej**

# A P Møller flaggar føroyskt

**Eitt av feløgunum í A P Møller konsernini, Esvagt, hevur saman við Thor í Hósvík gjørt felag, sum fer at reka vaktartænastu í samband við oljuvinnuna**

TÆNASTUVINNA

*Edvard Joensen*



*Bjarne Hansen er nevndarformaður í Svitzer, sum eigur Esvagt, ið nú hevur stovnað felag saman við Thor í Hósvík*

*Mynd: Edvard Joensen*

Danska felagið Esvagt í Esbjerg, sum er partur av A P Møller konsernini, hevur saman við Thor í Hósvík stovnað felag at reka vaktarhald við boripallar undir Føroyum.

Tað er A P Møller felagið Svitzer, sum eigur Esvagt. Nevndarformaðurin í Svitzer, Bjarne Hansen, sigur, at teir hava valt at fara undir samstarv við føroyingar við tí fyri eyga at sleppa upp í art, tá føroyska oljuvinnan av álvara byrjar.

Saman við partafelagnum Thor í Hósvík, sum millum annað eigur vaktarskipið Tórsvík, hevur Esvagt stovnað partafelagið Esvagt/Thor, sum fer at røkja vaktartænastu við boripallar undir Føroyum.

Bjarne Hansen sigur, at nýggja felagið hevur eina avtalu, sum so gott sum er í pottinum. Hann vil tó ikki siga, hat oljufelag talan er um, sum skal leiga skipið, sum Esvagt/Thor fer at hava siglandi undir føroyskum flaggi.

Skipið hjá felagnum er nýggja vaktarskipið Esvagt Connector, sum verður skrásett í Føroyum og fer at sigla við føroyskari manning.

Felagið Svitzer, sum eigur Esvagt, er gamalt felag., Tað er stovnað í 1833 og seinni yvirtikið av A P Møller. Svitzer hevur í dag 70 skip alt í alt. Tey eru skrásett í dótturfeløgum í Svøríki, Bretlandi og Danmark, sigur Bjarne Hansen, nevndarformaður.

# Fekk stóran skaða



*Tær báðar kvinnurnar, sum vóru í hesum bilinum, vórðu fluttar á Landssjúkrahúsið við smærri snuddum*

**Tríggir bilar vóru uppi í ferðsluóhappi við Streymin hóskvøldið. Tvær eldri kvinnur vórðu fluttar á Landssjúkrahúsið**

ÓHAPP

*Eyðun Klakstein*

Hóskvøldið nakað fyri klokkan sjey hendi álvarsligur samanstoytur við Streymin.

Tríggir bilar vóru við í óhappinum, og tvær kvinnur, sum vóru í eina bilinum, vóru fluttar á Landssjúkrahús við smærri snuddum.

Tær báðar kvinnurnar, sum eru um seksti ára aldur, vóru í bili sum var á veg suðureftir.

Bilurin hjá teimum gleið í nógv hálkuni og kom yvir í mótkoyrandi breytina. Fyrst koyrdi bilurin inn í bilverjuna, og síðani rendi hann inn í mótkoyrandi bil.

**Hálkan var orsøk**

Ein triði bilur, sum eisini var á veg suðureftir, varð eisini raktur.

Bilurin, sum tær báðar kvinnurnar vóru í, fekk stóran skaða, meðan hinir báðir bilarnir fingu minni skaða.

Løgreglan í Havn sigur, at tað var sera hált hóskvøldið, og at tað var hálkan, sum var orsøkin til óhappið við Streymin.